# 13 ára gamal seldi rúsevni

Løgreglan í Bergen tók í gjár ein 13 ára gamlan drong, sum er undir illgruna fyri at hava selt hasj í einum stórhandli í býnum. Vaktarmenninir í stórhandlinum fingu illgruna til drongin, og hvat hann fekst við, og teir sendu boð eftir løgregluni. Tá løgreglan tók tann 13 ára gamla, hevði hann fimm gramm av hasji uppi á sær, skrivar NTB. Løgreglan í Bergen sigur, at tað er sera sjáldsamt, at so ung fólk verða tikin fyri at selja rúsevni. Tann 13 ára gamli drongurin er nú latin barnaverndini í býnum.



# Lívlangt fongsul fyri barnamorð

Rætturin í Stockholm dømdi í gjár týsku kvinnuna Christine Schürrer lívlanga fongsulsrevsing fyri at hava myrt tvey børn í svenska býnum Arboga í fjør. Rætturin staðfesti sostatt dómin, sum kvinnan fekk í einum undirrætti, men hann hækkaði endurgjaldið, sum kvinnan skal rinda foreldrunum at børnunum. Rætturin sigur í niðurstøðuni, at tað má sigast at vera prógvað, at kvinnan myrdi børnini Max og Saga, og at hon royndi at myrða mammu teirra, Emmu Jangestig. Børnini vórðu funnin deyð og mamman illa særd.



*Ætlanin við nýggju matvørulógini er millum annað, at alt kjøt, sum skal seljast til ein triðjapart, skal vera slakta á góðkendum sláturvirki*

# Flettarin skal góðkennast

**Nýggj matuvørulóg er á veg. Í henni stendur millum annað, at alt kjøt, sum skal verða selt gjøgnum ein triðjapart, skal vera slakta á góðkendum sláturvirki**

SLÁTUR

*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Vinnumálaráðið hevur eitt uppskot til hoyringar hjá flokkunum í løtuni og í vinnunevndini hjá Løgtinginum. Talan er um eina nýggja matvørulóg.

Hetta arbeiðið hevur verið í gongd í langa tíð, tí mann leingi hevur hildið at matvørulógin frá 1985 er ótíðarhóskandi.

Hinvegin er ætlanin ikki ennattakakjallaraflettingina av, tí tá søla fer fram millum bónda og endaliga kundan er talan um eitt álit, har ikki verðurmett, at góðkenningar eru neyðugar.

Tó hugsar mann um, at bóndur, ið fletta nógvan seyð til dømis, skulu hava so eitt minstakrav er til reinføri og so framvegis.

- Tá mann flettir ein seyð, er tað øgiliga avmarkað við dálkingarvanda. Er hinvegin talan um nógvan seyð, so verður vandin beinanvegin størri, staðfestir Óluva Niclasen av Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

Høvuðsboðskapurin í uppskotinum er tí, at beinleiðis durasøla skal sleppa at halda fram, men at matvøruhandlar og matstovur bert skulu keypa kjøt frá góðkendum sláturvirki. Onki sláturvirki er tó í landinum í løtuni.

## Bóndafelagið positivt

Anna Rubeksen, forkvinna í bóndafelagnum, er fyri hugsanini í uppskotinum.

- Vit vilja sjálvandi hava skipaði viðurskifti á økinum. Tað hava vit ikki í løtuni, og tað kann bara vera ein fyrimunur hjá okkum, um bøndurnir kunnu vísa til eina góðkenning, sigur forkvinnan í bóndafelagnum. Hon leggur afturat, at fólk hava verið bangin fyri, at kjallaraflettingin dettur niðurfyri, men tað verður ikki talan um tað enn á sinni.

- Onkur tosar um at útflyta til ES og tá skulu fleiri góðkenningar til, men í løtuni megna vit ikki at metta heimamarknaðin, so hetta er ikki nakað sum verður enn, hóast summir bøndur hugsa um at flyta kjøt út, staðfestir Anna Rubeksen. Hon vísir somuleiðis á, at onki sláturvirki er í løtuni, men at onkur arbeiðir við einari tílíkari ætlan.

## Matstovurnar gleðast

- Hetta kann bara vera gott, sigur Ása Johnsdóttir, forkvinna í matstovu- og gistingarhúsfelagnum. Hon vísir á, at tað verður ein fyrimunur fyri matstovurnar, um tær kunnu vísa á, at maturin er góðkendur. Tó heldur hon tað vera løgið at felagið ikki er sett inn í málið, og als ikki hevur fingið tað til hoyringar. Men hon heldur fast við, at tað verður gott, tá gesturin fær eitt garanti fyri góðsku.

## Fyrireikingarbólkur setast

Tað verður tó hvørki í dag ella í morgin, at henda lóg verður sett í verk. Heilsufrøðiliga starvsstovan sendi nevniliga eitt skriv til Jóhan Dahl, vinnumálaráðharra, har tey biðja um at fáa ein bólk settan, sum skal finna besta leistin og bestu tíðarætlanina til uppskotið.

- Ætlanin skal innihalda realistiskar tíðarkarmar, lýsa ítøkiligt hvørji krøv skulu lúkast, hvussu vit ímynda okkum at krøvini verða lokin, kostnaður, stuðul frá tí almenna og so framvegis, sigur Heilsufrøðiliga starvsstovan í uppskotinum til bólkin.

Í bólkinum skulu vera umboð fyri vinnu, heilsumyndugleikar og politiskan myndugleika. Upprunaætlanin var, at Heilsufrøðiliga starvsstovan skuldi manna allan bólkin, men tað setir hon seg ikki føra fyri.

Hesum tekur Jóhan Dahl undir við, og vil hava ein bólk settan, sum skal arbeiða fram til ólavsøku, sum síðani skal koma við einum ítøkiligum leisti, har kostnaður, tíðarkarmur, kostnaður og avleiðingar vera greiddar.